# Starvsfólk til PE Tórshavn

PE í Tórshavn sóknast eftir dugnaligum starvsfólki til at leiða ein part av handlinum í Tórshavn. Umráði er: Kassin, breyð&køkur, góðgæti og kosmetik. Talan er um eitt spennandi og sjálvstøðugt starv við nógvum avbjóðingum.

PE leggur stóran dent á at nøkta tørvin á øllum gerandisvørum til kappingarførar prísir.

Sum umráðisleiðari í PE fær tú fulla ábyrgd av tínum øki. Tú varðar av søluni og innkeypinum og tú hevur eitt fólk at hjálpa tær.

Útbúgving innan handilsvinnuna er eingin treyt, men er tað ein fyrimunur, um tú kann vísa okkum á viðkomandi royndir.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Petur Eirik Djurhuus á tlf. 511346.

Ljóðar hettar sum tú? Send so eina skrivliga umsókn innan 18. september til:

**Spf. PE**
Heykavegur 2
Postboks 1258 · FO-110 Tórshavn

# Sølufólk til Hvítvøru-deildina á Hjalla

Vit sóknast eftir einum sølufólki til Vøruhúsið á Hjalla, at byrja skjótast tilber.

Talan er um tað nýggju Hvítvørudeildina. Vit kunnu bjóða tær eitt spennandi starv, við nógvum dagligum avbjóðingum.

Arbeiðið umfatar m.a. avgreiðslu av kundum, daglig røkt av handlinum og innkeyp.

Vit vænta, at tú ert fyrikomandi, tænastusinnaður, ágrýtin og dugir at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er ein fyrimunur um tú hevur royndir ella útbúgving innan handilsvinnu, men hetta er ikki ein treyt.

Meira fæst at vita við at venda sær til Birgir, tlf. 342500.

Skrivlig umsókn skal vera okkum í hendi seinast hósdagin tann 21. september 2006 og skal sendast til:

LITAVAL P/F

Box 1019 · 110 Tórshavn
att: Birgir
e-mail: bav@litaval.fo

PREKVALIFIKATIÓN

## Útbygging av Norðurlandahúsinum

Landsverk er byggiharri fyri almennar uppgávur, og henda verkætlan verður útboðin vegna Stýrið fyri Norðurlandahúsið.

Ætlandi verður útbyggingin framd í partnering. Samráðingar verða við áhugaðar arbeiðstakarar um luttøku í byggingini, grundað á byggiprogramm. Brutto fíggjarkarmurin er 13,5 mió. kr. Arbeiðið skal verða liðugt 1. mars 2008.

**Lýsing av verkætlanini**
Norðurlandahúsið hevur ætlan um at víðka um verandi hølisviðurskifti við einum 270 m2 stórum tilbygningi í tveimum hæddum ætlaður ráðstevnum, framsýningum v.m.

**Umbøn um luttøku**
Umbønin skal sendast til lv@lv.fo

ella:
Landsverk
Postboks 78
Tinghúsvegur 5
FO-110 Tórshavn

Áheitanin skal verða okkum í hendi í seinasta lagi mánadagin 25. september 2006.

**Samtøk og felagsskapir**
Allir luttakarir í einum samtaki ella líknandi felagsskapi skulu geva skrivliga váttan fyri felags hefting og ábyrgd fyri sáttmálanum. Felagsskapir og samtøk skulu harafturat frammanundan tilnevna ein umboðsmann við skjalprógvari fulltrú til, vegna felagsskapin ella samtakið at tekna bindandi avtalur við byggiharran.

**Upplýsingar at nýta til prekvalifikatiónina**
Umsøkjarir skulu saman við eini umbøn um luttøku senda fylgjandi upplýsingar við:

- Upplýsingar um arbeiðstakarans egnu viðurskiftir og tær neyðugu upplýsingarnar og formleikarnar til meting av tí kravdu minstuorku av búskaparligum, fíggjarligum og tekniskum slagi.
- Upplýsingar um bygnaðin hjá fyritøkuni, herundir møguligt samband við móðirfelag.
- Váttan ella trúnaðarváttan um, í hvønn mun arbeiðstakarin hevur ógoldnað skuld til tað almenna, ið er fallin til gjaldingar.
- Avrit av viðkomandi vinnulívstrygging, upplýsing um eginpening og javna í roknskapi, tá ið søkt verður, saman við váttan av samlaða umsetninginum í meðal seinastu trý árini.
- Upplýsing um árliga meðaltalið av fólkum í starvi hjá fyritøkuni.
- Ummæli frá samsvarandi uppgávum.
- Lívsgongdarlýsing (cv) hjá lyklafólkum, ið verða sett á hesa uppgávu.
- Upplýsingar um góðsku-, trygdar- og heilsuskipanir, umframt umhvørvisstýrisskipanir hjá fyritøkuni.

www.sansir.fo

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postsmoga 78, Tórshavn,
Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Íverksetanarstudningur til listafólk í 2007

Mentanargrunnur Landsins letur einum listafólki íverksetanarstudning við støði í listaligum og fakligum metingum.

Íverksetanarstudningurin skal lætta um hjá evnaríkum listafólkum, serliga ungum, at koma víðari við teirra skapandi listaarbeiði. Studningurin kann nýtast til tilfar, leiga av atelier, námsferðir o.l.

Íverksetanarstudningurin er kr. 75.000,- árliga og kann í mesta lagi latast sama persóni í 2 ár.

**Umsóknir skulu vera nevndini í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 15. desember 2006.**

**Mentanargrunnur Landsins**
Tórgarðsgøta 42 • FO-100 Tórshavn • Tlf. 32 08 42 • Fax 31 19 98
mentam@post.olivant.fo • www.mentanargrunnur.fo

## *Arbeiðshandskar*

*til øll endamál - bæði á sjógvi og landi*

Beinleiðis frá framleiðara

**Landsins størsta úrval**
frá eingangshandskum til fóðraðar Japan-handskar

ADC-Heilsølan spf
Láarvegur 14 • 100 Tórshavn • Tel. 315828 • Fax 315893
adc@adc.fo

Sosialurin 311820